ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 23. juli 2009




Sosialurin skrivaði í farnu viku um málið, sum framvegis ikki er loyst, nú bara seks dagar eru til finalan í kappingini um løgmanssteypið skal spælast

# 14 feløg mótmæla ólavsøkuavtaluni

**Sunnudagin fekk Fótbóltssambandið mótmælisskriv frá 14 feløgum, sum mótmæla ólavsøkuavtaluni, Fótbóltssambandið hevur gjørt við HB og B36. Tað er problematiskt, ásannar forsetin í Fótbóltssambandinum**

FÓTBÓL1TUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í hesum skrivi gera feløgini vart við, at tey als ikki kunnu góðtaka avtaluna, sum Fótbóltssambandið hevur gjørt við HB og B36 í samband við steypafinaluna, sum skal spælast á ovara völli í Gundadal í Havn ólavsøkudag.

14 umboð fyri hesi 14 feløg hava sett sítt navn á hetta skriv, og forsetin í Fótbóltssambandinum, Høgni í Stórustovu ásannar, at tað er problematiskt.

– Tað er púra rætt. Vit hava fingið tríggjar reglur sendandi frá nøkrum feløgum, sum vit eisini ætla okkum at svara, sigur Høgni í Stórustovu. Hann greiðir frá, at teir nú royna at fáa tey praktisku tingini kring finaluna í lag, og at Fótbóltssambandið alla tíðina er í dialogi við finalufeløgini, sum hann tekur til.

**Tveir faktorar**

Høgni í Stórustovu vísir á, at tað eru tveir faktorar, sum eru galdandi í hesum málinum. Annar er, at øll eru samd um, at finalan eigur at verða spæld á ólavsøku í Havn. Hin er, at har eru nøkur viðurskifti hvat inntøkubýtinum av sjálvum dystum viðvíkur, ið ikki allir partar eru nøgdir við.

Trýr framvegis upp á ólavsøkufinalu

Men hóast ósemjuna, sum ikki bara umfatar EB/Streym, Víking og Fótbóltssambandið, men eisini 12 onnur limafeløg í Fótbóltssambandinum, so trýr Høgni í Stórustovu, forseti í Fótbóltssambandi Føroya framvegis uppá, at finalan í kappingini um løgmanssteypið verður spæld á ovara völli í Gundadali í Havn ólavsøkudag.

**Steypafinala í Klaksvík**

Verður hetta av ongum, eru sjálvsagt eisini aðrir møguleikar. Millum annað hevur formaðurin í KÍ, Tummas Lervig, sagt við Sosialin í dag, at um tað verður ein trupulleiki at spæla finaluna í Havn, so sær hann ongan trupulleika í, at hesin dystur verður avgreiddur í Klaksvík.

Málið í stuttum:

## Ólavsøku-avtalan

**EB/Streymur og Víkingur vilja ikki finna seg í, at HB og B36 skulu fáa helvtina av inntøkunum, steypa-finalan kastar av sær**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í farnu viku skrivaði Sosialurin, at steypafinalan eftir øllum at døma er í stórum vanda. Hóast eingin av formonnunum ynskir at siga tað stóra, ljóðar tað fyri vist, at EB/Streymur og Víkingur eru ógvuliga ónøgd við býtið av inntøkum, steypafinaludysturin kastar av sær.

Orsøkin er ein avtala, Fótbóltssambandi hevur gjørt við HB og B36, sum eisini skulu hava sín part av inntøkunum av dystinum. Sum greitt var frá í blaðnum hósdagin í farnu viku, hava havnarfeløgini havt sum siðvenju at spæla dyst á ólavsøku, men sum tað eisini stóð skrivað, hevur hesin dysturin flutt seg frá at vera stórdystur til ein týdningarleysan venjingardyst. Ein venjingardystur, sum helst hevði verið av ongum í ár, tí landskappingarskráin snøgt sagt ikki rúmar hesum. Kortini hevur Fótbóltssambandið gjørt eina avtalu við HB og B36, sum tryggjar teimum helvtina av inntøkunum av steypafinaluni.

Við øðrum orðum skulu finaluliðini býta inntøkurnar av steypafinaluni við tvey feløg, sum als ikki eru partur av henni. Tað eru tó HB og B36, sum leggja vøll til finaluna, og tískil er tað ikki órímiligt, at tey fáa eina upphædd fyri lán av vøllinum, men sum skilst kunnu EB/Streymur og Víkingur – umframt 12 onnur limafeløg í Fótbóltssambandi Føroya – ikki góðtaka, at HB og B36 skulu fara avstað við helminginum av inntøkunum.

Ónøgdin sigst vera so stór, at um EB/Streymur og Víkingur ikki fáa størri part av pengakøkuni, sum stendur eftir eftir steypafinaluna, sýta tey fyri at spæla steypafinaluna í Havn á ólavsøku.